Deyði fiskurin ikki tryggjaður

P/f Fiskaaling hevði ikki fiskin á Lívfiskastøðini í Skopun tryggjaðan. Sostatt fer eitt søluvirði fyri umleið 3 miliónir fyri skeyti. Men hetta er eitt val, ið má gerast, og nevndin hevur valt at tryggja genetiska arbeiðið við eisini at hava stød úti í Hesti. - Trupult er at gera upp í peningi tað arbeiðið, ið er gjørt á genetiska økinum, sigur stjórin

TRYGGING
Dagfinn Olsen

Fleiri samanfallandi óhapp gjørdu, at fiskurin á Lívfiskastøðini í Skopun doyði leygarmorgunin. Fiskurin er ikki tryggjaður hjá nøkrum tryggingarfelag og missir P/f Fiskaaling tí eitt søluvirði áljóðandi einar 3 milliónir.

- Nevndin hevur valt at tryggja á tann hátt, at vit hava tvær støðir. Eina minni stød úti í Hesti. Hetta er fyri at tryggja seg á genetiska økinum og fyri at alt arbeiði, ið er gjørt innan alingina, ikki skal farast. Tí hetta kann illa gerast upp í peningi, sigur Hørður Wardum, stjóri á Fiskaaling.

Hann sigur, at mista søluvirði er áljóðandi einr 3 milliónur krónur. Men tað er eitt val, ið má gerast, hvussu ein metir um og tryggjar seg.

- Høvdu vit havt tryggjað fiskin í einum tryggingarfelag, so fingu vit pening aftur, men høvdu so ongan fisk. Og nógv arbeiði innan alingina hevði verið farið fyri skeyti. Tí er tað at val, ið má gerast, hvussu ein tryggjar seg, sigur Hørður Wardum.

- Sjálvsagt høvdu pengar verið kærkomnir í slíkari

støðu, men tað kostar eisini at tryggja, sigur Hørður Wardum.

Fiskaaling er almen ogn. Hóast samanhang ikki er beinleiðis við nevndaravgerðina og almenna politikkin, so er almenni politikkurin á tryggingarøkinum, at ikki allar landsins ognir nýtast at vera tryggjaðar. Hetta hevur umsitingin gjørt greitt í rundskrivi.

Fíggjarmálaráðharrin:

Talan um stór virði, áðrenn tað loysir seg at tryggja

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sigur seg ikki ivast í, at almenni politikkurin á tryggingarøkinum er rættur. Tí tað kostar nógv at tryggja og tað skal stórur skaði til, áðrenn tað loysir seg at tryggja. Ístaðin fyri at tryggja verður hetta avgreitt yvir játtanarskipanina og ymsu stýrini hava eisini pening til rakstur

TRYGGING
Dagfinn Olsen

Almenni politikkurin á tryggingarøkinum er, at allar landsins ognir ikki nýtast at vera tryggjaðar. T.d. bygningar o.a. Hetta er gjørt greitt í rundskrivi frá umsitingini.

Hóast einki greitt samanfall er millum avgerðina hjá nevndini í P/f Fiskaalaing um ikki at tryggja deyða fiskin í Skopun, og landsins tryggingarpolitikk, so kann hetta yvirførast.

- Vit gjalda nógvar milliónir í trygging. Men tá talan er um almennar bygningar, so er ofta talan um smærri bygningar. Og ein bygningur skal vera dýrur, áðrenn tað loysir seg at tryggja. Og tað eru eisini sera fáir totalskaðar millum ár og dag, sigur Karsten Hansen.

Hann vísir á, at hesin tryggingarpolitikkur er heilt vanligur í londunum kring okkum.

Men hóast almennu ognirnar ofta ikki eru tryggjaðar, so er eingin ávís konto á figgjarlógini til tap á hesum økinum.

- Nei, eingin ávís konto er, tí hvat skuldi ein sett av? Hetta verður avgreitt yvir játtanarskipanina og so hava ymsu stýrini eisini pening til rakstur, sigur Karsten Hansen.

- Vit skulu fáa sum mest fyri hvørja skattakrónu, og eg eri sannførdur um, at tað verður gjørt best á henda hátt, sigur figgjarmálaráðharrin.

Tryggingin:

Vit høvdu goldið við kassa eitt

Tryggingarfelagið Føroyar ivast ikki í málum, sum málinum við Lívfiskastøðini í Skopun. Vit høvdu goldið við kassa eitt beinanvegin, sigur Hákun Steingrímsson, deildarstjóri á Tryggingarfelagnum Føroyar

TRYGGING
Dagfinn Olsen

- Vit eru til, so at vit kunnu koma inn í myndina, tá óhappini henda.

Hetta sigur Hákun Steingrímsson, deildarstjóri á sjódeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Hann vil ikki gera beinleiðis viðmerkingar til málið um Lívfiskastøðina í Skopun, har allur fiskurin doyði leygarmorgunin. Streymslit og telefonslit fordu til óhappið.

- Nú kunnu vit bert taka hugsað dømi. Men vit høvdu goldið við kassa eitt! Vanlig mannagongd er, at meta vit, at grundarlag er at fara víðari við málinum, og finna tey, ið hava skuldina í slíkum óhappum, so koyra vit málið víðari. Vit keypa so at siga kravið, sigur Hákun Steingrímsson.

Í førinum við Lívfiskastøðini í Skopun vil tað siga, at krav kanska hevði verið reist mótvegis Føroya Tele og SEV.

Vit høvdu enntá goldið, um starvsfólk høvdu ábyrgdina og áttu mistøkini. Tað er jú eigarin, ið tryggjar seg ímóti øllum, ið hugsast kann. T.d. tryggjar ein reiðari seg. Um so skiparin siglir á land við vilja, so kann reiðarin ikki lastast fyri tað, sigur Hákun Steingrímsson.

Hákun Steingrímsson sigur, at sjálvsagt kann hann sum tryggingarumboð bert vera glaður fyri, at talan í førinum við Lívfiskastøðini, ikki verður um at gjalda við nakran kassa, tí einki var tryggjað.